# TILTØK

**Gudstænastur**
**22. sunnudag e. Trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00, Bergur D. Joensen, Sverri Steinhólm og Jan Mortensen, prestur í messianskari kirkju í Tel Aviv í Ísrael. Altargangur. Talvan gongur fyri Hina Føroysku Ísraelsmissiónina
***Argja kirkja:*** kl. 11.00, Heri Joensen, altargangur
***Haldarsvík:*** kl. 12.00, Familjugudstænasta, Uni Næs
***Kollafjørður:*** kl. 12.00, altarg., Mogens Tilsted Christensen.
***Broytt kirkjutíð: Í Vestmanna verður nú farið í kirkju kl. 12.00.***
***Miðvágur:*** kl. 11.00, altarg., David Johannesen
***Bøur:*** kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
***Skála:*** kl. 11.00 Jógvan Fríðriksson
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12.10, altarg., Jógvan Fríðriksson
***Gøta:*** kl. 12.00, Martin R. Jacobsen. ***Frá hesum sunnudegi verður aftur farið í kirkju kl. 12.00 í Gøtu.***
***Viðareiðis kirkja:*** kl. 12.00, altarg., Elsa Funding
***Øravík:*** kl. 11.00, altarg., Jónsvein Bech
***Leiti:*** kl. 12.00, altarg.,
***Sumba:*** kl. 14.00, altarg., Patrick de Neergaard

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 á Familjumøtinum talar bróður Nicholas, kl. 11.30 Samvera við drekka. Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12.00 talar Jógvan Z. um Sannleikar úr Rómbrævinum (2:1-3:9). Barnaansing er undir møtinum. Sunnudagsskúlin kl. 12.00. Týskvøldið kl. 20.00 Møti har Ása og Ólavur Jøkladal luttaka. Møti kann hoyrast á netinum. www.livdin.fo

**Hóskvøldið 18. september**
***Sambýlið við Bøgøtu:*** kl. 19.30 Niels Pauli Danielsen

**Meinigheitshúsið**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Reimund Langgaard, evni: Gevaratænasta, ung luttaka við sangi.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Hósdag kl. 20.00 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur. Sunnudagin kl. 11.00 Møti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti har menninir stíla fyri. Øll eru vælkomin.
www.frelsunarherurin.fo

**Fríkirkjan Oasan**
Vikuskiftismøtini byrja í kvøld kl. 20.00 v/Hans Berntsen.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 møti v/ Mogens T. Christensen, sangluttøka v/ Gulak og Jónhildu, Hallmar og Hedvik.
Leygarkvøldið kl. 20.00 møti v/Jóanes og Sigrid Mortensen, Signheðin Olsen og Terja Nilsen, sangluttøka v/Torbjørn, Steintór og Annika.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 v/ Thomas J. Askham, sangluttøka v/streingjakóri í Sørvági.
Mánadagin kl. 17.15 til 18.00 venur barnakórið, aldur 1. flokkur og eldri, kl. 20.00 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Ebenezer**
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti, kl. 20.00 Kvinnumøti.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti. www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16.00 Eldrahugni.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti, Pauli Høj talar og Birgit Nónklett syngur.
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. www.gospel.fo

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.00 Møti.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Johan Henriksen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag, kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Bøn fyri samkomuni, kl. 19.00 Chil.
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Familjugudstænasta, kl. 16.00 Samkomufundur.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 12.00 Møti. Vit fáa vitjan av Ceciliu og Jonhard Poulsen, sum í 30 ár hava búð og virkað í Grønlandi.

**KFUM og KFUK í Havn**
Hósdagin kl. 19.30 í KFUK: Bíbliutími við Hans Jacob Joensen, bispi.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Bahá'i Miðstøðin**
*www.bahai.fo*
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við breyðbróting.

**Filadelfia, Miðvágur**
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.

**Miðvágs missiónshús**
Møti hóskvøldið við luttøku frá Ísraelsmissiónini **er flutt** og verður ístaðin **í Missiónshúsinum í Sørvági** saman við hugnaløtuni hjá sjómanskvinnuringunum **hóskvøldið kl. 20.00.**

**Missiónshúsið Libanon**
Sjómanskvinnuringurin byrjar aftur við hugnaløtu hóskvøldið 20. oktober kl. 20.00. Jan Mortensen prestur fyri messianskari meinigheit í Tel Aviv í Ísrael kemur at tala um evnið Jerúsalem – Guds býur. Thorleif Johannesen sjómanstrúboðari endar løtuna við at vísa ein film, og greiða frá arbeiðinum í sjómansmissión. Streingjakórið syngur. Mint verður á jólapakkarnar. Innsamlað verður til Ísraelsmissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagskúli, kl. 18.00 Møti v/ Elsu í Garði og Kim og Jákubinu Hansson.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Anju og Øyvind Bjerkenes.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl. 11.00.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Hósdagin kl. 17.00 Liljur.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti v/ Pola Jacobsen.

**Bønhúsið, Søldarfjørður**
Sunnudagsskúli kl. 13.30. Á møtinum sunnukvøldið kl. 18.00 talar Hjalmar Hansen, Rituvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Karmel, Eiði**
Sunnukvøldið kl. 19.00 Møti v/ Egil Joensen.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti v/ Helle Ottsen.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagskúli, kl. 18.00 Sangmøti, Olvheðin Jacobsen talar.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti við Sannu Hammer og øðrum úr YWAM.
Leygarmorgun kl. 10.00 Bøn og kl. 20.30 Ungdómsróp við Sannu Hammer og øðrum úr YWAM.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti við Sannu Hammer og øðrum úr YWAM.
Mánadag til fríggjadag kl. 6.15 Morgunbøn. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Hósdagin kl. 19.00 Bønarløta, kl. 20.00 venur gospelkórið »Gleðið«.
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 felagsskapurin »Provita« greiðir frá arbeiðinum, kl. 21.00 Ungdómsmøti – evni: Ísraelsmissiónin v/ Jan Mortensen. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Evnismøtir vikuskiftið 22. og 23. oktober v/ John S. Myllhamar, trúboðara.
Leygarkvøldið kl. 20.00 verður evnið: Niðurfarin til heljar.
Sunnukvøldi kl. 18.00 verður evnið: Hin roynda trúgvin. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samljóð, Skopun**
Hans og Inge Bentzen frá Danmark, sum biðja fyri sjúkum, verða til hesi møtir fríggjakvødið kl. 20.00 og leygarkvøldið kl. 20.00. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Hóskvøldið kl. 20.00 kemur Sjómanskvinnuringurin saman.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18.00 Møti.
Vikuskiftismøtir vera 28.-30. okt. Hjartaliga vælkomin.

**Kirkjan í Fámjin**
Missiónsvika verður í døgunum 4.-6. november. (Nærri lýst seinni).

**Frelsunarherurin, Vágur**
Heimaforbundssunnudagur v/ Soldatavígslu kl. 18.00, Sigrid Ludvig talar. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 20.00 Guitarskúli, 12 ár og eldri.
Týsdagin kl. 18.00 Juniorklubbur, kl. 20.00 Streingjakórið øvar.
Onsdag kl. 18.00 Juniormøti.
Einki Heimaforbundsmøti.

**Ørkin, Reykjavík**
2.-7. nov. fær Örkin vitjan av Jógvani Fríðrikssyni, presti o.ø. Í hesum sambandi verður møti, hugnakvøld og gudstænasta.
Møti hvørt sunnukvøld kl. 20.30. Aftaná er kaffi. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.hotel-orkin.com

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Teldupostur:
tilhald@torshavn.fo
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagin 17. oktober***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45 Enskt á byrjanarstigi 1
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, telving, bobbspæl, landastrok, dart og onnur spøl.
***Møguleiki er at koma sum gestur. Tilm. til døgurðan miku- og fríggjadg. tlf. 316491***
***Týsdagin 18. oktober***
kl. 10.00-11.30 Vit syngja, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00 Skóleistar, Gulla Øregaard
***Mikudagin 19. oktober***
kl. 10.00-13.30 Matgerð, Anne Grete Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestur. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 10.00-17.00 Handarbeiði, Dominobinding, binding á knagum o.a.
***Hósdagin 20. oktober***
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00-11.45 Enskt á byrjanarstigi 2, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00-17.00 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagin 21. oktober***
kl. 10.00-13.30 Matgerð – Anne Grete Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Tilm. mánadag tlf. 316491
kl. 10.00-12.00 Tekning og máling (havi tilfar við).
Vegleiðing er á staðnum.
kl. 14.00-17.00 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15.00 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Dagtilhaldið Fløvi**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið er mánadag til fríggjadag kl. 15 – 18.
***Mánadagin 17. oktober***
Fimleikur
***Týsdagin 18. oktober***
Prát og sangur. Vit spæla landastrok.
***Mikudagin 19. oktober***
Boccia
***Hósdagin 20. oktober***
Myndaskering
***Fríggjadagin 21. oktober***
Byrjandi enskt
v/ Annette Gaardlykke.
***Sum nakað nýtt verður matgerð fyri pensionistar fyrrapart mikudag í Fløvanum v/ Varnu av Rana. Matgerðin er undir kvøldskúlaskipanini. Møguleiki verður eisini at koma til døgurða hendan dagin sum gestur. Kostnaður. Tilmelding á tlf. 448518 ella 222922.***

*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldin Hugnin í Sandoynni**
Er opið mánadag og mikudag kl. 14.00 til 17.00.
Drekkamunur er at fáa báðar dagarnar eins og bløðini eru til taks. Øll eru vælkomin.

**Eldrafelagið Nón**
Í vetur koma vit saman til handaligt arbeiði hvønn týsdag frá kl. 15.00 til 18.00. Byrjað verður týsdagin 18. oktober.

**Tilhaldið á Toftum**
tlf. 448690
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 14.00-18.00
***Mánadagin 17. oktober***
Opið hús
***Týsdagin 18. oktober***
Telduskeið frá kl. 15.00-17.00 v/ Derdrei Hansen
***Mikudagin 19. oktober***
kl. 15.00-16.00 Vit syngja v/ Martin Restorff Jacobsen.
***Hósdagin 20. oktober***
Vit spæla spøl
***Fríggjadagin 21. oktober***
Handaligt arbeiði

*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin í Tilhaldið á Toftum.*

## 60 ár

16. oktober fylti Asbjørn Petersen, Haldórsvík 60 ár. Dagurin verður hildin í Avhaldshúsinum fríggjakvøldið.

Leygardagin 22. oktober verður Elsa Maria Sigurdson, Klaksvík, 60 ár. Hon er burturstødd.

## 80 ár

Sunnudagin 30. oktober 2005 verður Svanhild Danielsen, Tórshavn, 80 ár. Opið hús verður leygarkvøldið 29. oktober 2005 kl. 19.00 í hølum Starvsmannafelagsins J. H. Schrøtersgøta 9, Tórshavn.

## Brúdleyp

Í dag, 20. oktober kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Jórun Udbø Nielsen úr Fuglafirði og Trúgvi Johansen úr Havn. Brúdleypsadr. Hotel Føroyar.

Leygardagin 22. oktober giftast Elsa Martina Huusgaard, Syðrugøta og Yuichi Sakaguchi, Osaka, Japan. Vígslan verður kl. 14.00 í Filadelfia í Gøtugjógv. Øll tey, ið vilja gleðast saman við brúðarparinum á hesum stóra degi, eru hjartaliga vælkomin í veitslu kl. 19.00 í Filadelfia.

Leygardagin 12. november kl. 16.00 giftast í Viðareiðis kirkju Sólrun Sørensen, Viðareiði og Egin Fríði Ørvarodd, Sandur. Veitslan verður á Hotel Norð kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 451049, 451028 ella 361094 áðrenn 1. november.

## Silvurbrúdleyp

Mánadagin 7. november hava Marjun og Virgar Hentze á Eiði, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 19. november í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í silvurbrúdleypið, verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 423065 ella 224382 í seinasta lagi 12. november.

## Gullbrúdleyp

Leygardagin 22. okotober hava Súsanna og Meinhard Jacobsen á Argjum gullbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið, eru vælkomin í heimið í Reynstún 18 ímillum kl. 10.00 og 16.00.

Tann 19. november hava Marna og Jákup Joensen á Eiði gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Ítróttarhøllini á Eiði sama dag. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í gullbrúdleypið, kunnu siga frá á tlf. 423078 ella 723078 ella á teldupost **mj_gullbr@yahoo.dk**